# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*- Eg unni Regini eitt finalupláss, og hvussu víkir og vendir, verða bæði tapari og vinnari her í húsinum
Niels Joensen, formaður í VÍF*

## Meistararnir vóru hepnir

**FC Porto hevði uppiborið meira enn javnleik á útivølli móti Manchester United, og í Villarreal spældi eitt skert Arsenal 1-1**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Manchester United var í stórum trupulleikum á heimavølli móti FC Porto, tá fjórðingsfinala í Champions League var á skránni í gjárkvøldið.

Porto kom á odda longu eftir fýra minuttum, og hóast Rooney javnaði fyri verjandi meistararnar eftir risa verjukiks, sat Porto á tí mesta fyri steðgin.

Eftir steðgin gekk meira javnt á, og heimaliðið tóktist nær sigrinum, tá Tevez skoraði til 2-1 fimm minuttir undan leikloki. Men Porto fekk seinasta orðið, tá Gonzalez stóð leysur eftir lítið sannførandi verjuspæl. Og tí stendur Porto við nógv betra útgangsstøðinum undan seinnu hálvfinaluni, sum verður spæld um eina viku.

Í Villarreal var Arsenal undir stórum trýsti. Fyrst kom heimaliðið á odda, og tá bæði Almunia og Gallas noyddust skaddir av vøllinum, stóð nógv á yngru spælarunum á liðnum. Tað eydnaðist tó at vinna sær ein 1-1 javnleik við einum framúr máli frá Adebayor, og so er London-liðið helst væl nøgt undan returuppgerðini.

**Manchester United-FC Porto 2-2 (1-1)**
0-1: Cristian Rodriguez, 4.
1-1: Wayne Rooney, 15.
2-1: Carlos Tevez, 85.
2-2: Manuel Nicolas Gonzalez, 89.

Villarreal-Arsenal 1-1 (1-0)
1-0: Marcos Senna, 10.
1-1: Emmanuel Adebayor, 66.



*Feðgarðnir Frammi í Gerði í Kvívík eru undan FM-finalunum í Atlantic Airways-kappingini í tí serligu støðu, at pápin er formaður í VÍF og sonur spælir við H71*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

# VÍF og H71 undir sama taki

**Faðir og sonur í Kvívík hittast sum kappingarneytar í FM-finalunum hjá monnum, tí annar er formaður í VÍF og hin spælari í H71.
– Hvussu víkir og vendir, verða bæði tapari og vinnari her í húsinum, staðfesta báðir tveir**

HONDBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Í einum av húsunum Frammi í Gerði í Kvívík hevur hondbóltsprátið verið serliga lívligt í vetur, og nú tað stundar til FM-finalurnar í Atlantic Airways-kappingini, ber av. Orsøkin er heilt einfalt tann, at maðurin í húsinum, Niels Joensen, er formaður í VÍF, meðan sonurin, Regin Joensen, spælir við H71.

–Tað er eitt sindur serligt, og sjálvandi telja kenslurnar fyri VÍF nógv, tí øll trý børnini hava spælt har. Men tað er ikki so einfalt kortini, og eg má viðganga, at hetta er mín dreymafinala. Eg unni Regini eitt finalupláss, og hvussu víkir og vendir, verða bæði tapari og vinnari her í húsinum. Tapari verði eg undir øllum umstøðum, so ella so, sigur Niels, sum í hesum »tap-og-vinn« prátinum fær viðhald frá soninum, hóast teir nú eru kappingarneytar.

– Eftir at Regin fyri tveimum ella trimum árum síðani var kosin ársins stjørnuskot, steðgaði hann eitt sindur upp, so tí trongdi hann til onkra broyting. Hana hevur hann fingið í Hoyvík, tí tað hevur gingist væl hjá honum í vetur – og sjálvandi eisini hjá hoyvíkingum. Tey hava tikið væl ímóti honum og hann trívist sera væl í H71.

Hesum tekur Regin beinanvegin undir við, og hann krógvar ikki, at hann er blivin stuðlaður fult út av pápanum, hóast áhugamálini koma eitt sindur í bland, nú annaðhvørt VÍF ella H71 verður meistari.

– Øll spyrja nógv, nú finalurnar nærkast, hvørjum pápin mín í veruleikanum heldur við, og so vilja tey eisini hava at vita, hvussu tað kennist at skula spæla finalur ímóti VÍF, sum eg eri uppvaksin í. Og prátið er sjálvandi eisini merkt av, at svágurin spælir við VÍF, sigur Regin, sum tó ikki er í iva um, hvar hansara heitastu kenslur eru í hesum døgum.

–Nei, nú eri eg so svartur, sum eg fái verið. Tá tú venur fýra ferðir um vikuna og spælir allar hesar dystirnar gjøgnum veturin, so gert tú sjálvandi alt fyri at vinna. Og nú er altavgerandi fyri meg, at vit í H71 vinna á VÍF og gerast meistarar. Tað hevði verið stórt at sloppið at vunnið tað saman við hoyvíkingum, ið ongantíð hava verið meistarar fyrr.

# Eina ferð aftrat ella fyrstu ferð

**FM-finalurnar í hondbólti hjá monnum koma annaðhvørt at geva vestmenningum sítt meistaraheiti nummar 22 ella hoyvíkingum sítt fyrsta nakrantíð**

HONDBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Júst sum hjá kvinnunum, hava VÍF og H71 sera ymiska tilgongd til FM-finalurnar, tí meðan VÍF ikki færri enn 21 ferðir hevur verið føroyameistari í bestu mansdeildini, eigur H71 enn sítt fyrsta meistaraheitið á. Besta úrslitið hjá H71 higartil er steypasigurin afturi í 1998.

Um hugt verður at dystunum teirra millum í vetur, hevur H71 havt munin, hóast VÍF á stigatalvuni endaði trý stig frammanfyri og tískil eigur teir fyrimunir í sambandi við finalurnar, sum tað gevur. Eitt nú skal ein møgulig triðja finala spælast í Vestmanna.

Tá liðini møttust í Hoyvík í november, vann H71 23-20, og í desember gjørdist talan um knúsandi stórsigur til hoyvíkingar, sum í Vestmanna vunnu 33-25. Síðani møttust liðini aftur í Vestmanna í januar, tá VÍF vann 29-27, men tá vestmenningar aftur vitjaðu í Hoyvík í februar, vann H71 við ikki færri enn 13 málum, 36-23.

Men tey úrslitini hava sum so einki annað at siga nú, enn at tey kunnu stimbra sjálvsálitið eitt sindur, tí finaludystirnir eru tveir ella tríggir nýggir dystir, har alt stendur upp á spæl. Møguleikarnir eru bara tveir í tali, tí annaðhvørt endurtekur søgan seg – ella verður søga skrivað!